## Tikararnir hava gíslar

ST vil vera við, at teir Tamilsku Tikararnir í Sri Lanka hava tikið fleiri almenn starvsfólk sum gíslar, og at teir nokta teimum at sleppa burtur úr økinum, har tikararnir berjast við stjórnarherin. Uppreistrarmenninir hava verið fyri fleiri ósigrum í seinastuni, og teir eru nú riknir saman á eitt øki, sum er einar 400 ferkilometrar har norðuri í landinum. Men har eru eisini meiri enn 200.000 sivilfólk, og Tamilsku Tikararnir brúka fleiri teirra sum gíslar fyri at forða stjórnarherinum at leypa á, sigur ST.




## Prestar stjólu úr talvuni

Tveir katólskir prestar í amerikanska statinum Florida dugdu ikki at halda fingrarnar burturi frá pengunum, sum komu í talvuna, tá innsavnað bleiv. Tí fór ein partur av pengunum til elskarinnur hjá prestunum og til spæliferðir til Las Vegas. Annar presturin, tann 81 ára gamli John Skehan, viðgekk á rættarfundi í gjár at hava stolið fleiri hundraðtúsund dollarar, meðan hin skuldsetti presturin noktaði seg sekan. Ákæruvaldið heldur, at teir báðir hava tikið millum fimm og seks milliónir krónur frá kirkjuni.

# Móttøka verður fyri Breiðanesi og Hamranesi

**- Eg ivist onga løtu í, at fyrrverandi Navarin og Borgarin fara at fáa stóran týdning fyri økið – ikki bara fyri okkara kommunu, men fyri alla Suðuroynna, sigur borgarstjórin í Hvalbiar kommunu, Otto West, sum fer at halda røðu, tá skipini koma til bygdar seinnapartin í morgin**

MÓTTØKA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Leygardagurin verður ein stórur dagur hjá hvalbingum og suðuroyingum í síni heild. Tá koma skipini, sum felagið TG Fish síðsta heyst keypti frá Føroya Banka, á Hvalba.

Skipini eru nú á veg úr Danmark, har serliga hevur verið hugt at motorunum. Ein partur stóð fyri klassing, og nýggju eigararnir hava gjørt tey ting, sum gerast skulu – eisini nakað frammi í tíðini.

Hvalbiar kommuna fer leygardagin at skipa fyri móttøku og borgarstjórin, Otto West, fer at halda røðu.

### Aðru ferð

Otto West hevur sitið í bygdaráðnum síðan ár 2000, og í fjør summar gjørdist hann borgarstjóri, tá Levi Niclasen tók seg aftur.

Á seinasta kommunuvali varð hann afturvaldur, og nú situr hann sum borgarstjóri í nýggja bygdaráðnum.

- Tá Sjagaklettur kom á Hvalba fyri umleið seks árum síðan, helt eg eisini eina røðu. Tá var eg formaður í trivnaðarnevndini, sigur Otto West.



*Otto Vest, borgarstjóri í Hvalbiar kommunu, fer at halda røðu. Hetta verður aðru ferð, hann heldur røðu fyri skipum, sum koma til bygdar*

*Mynd: Áki Bertholdsen*



*Seinnapartin í morgin stevna fyrrverandi Navarin og Borgarin inn í havnina í Hvalba, har bygdaráðið fer at skipa fyri móttøku*

Hann ivast onga løtu í, at Navarin og Borgarin fara at fáa stóran týdning fyri økið – ikki bara fyri Hvalbiar kommunu, men fyri alla Suðuroynna.

- Vit eru sera fegin um, at tað eydnaðist at keypa skipini til Suðuroyar, leggur hann aftrat.

Nakað av forvitni og spenningi hevur sjálvandi verið um, hvussu gomlu Navarin og Borgarin fara at kallast, nú teir eru vorðnir partur av fiskiskipaflotanum í Suðuroy.

Hóast skipini enn ikki eru komin til bygdar, kunnu vit avdúka, at tey vera heimahoyrandi í Hvalba, og nýggju nøvnini eru Hamranes og Breiðanes.

Tað er felagið P/F Sjagaklettur, sum er størsti einstaki eigari í nýggja felagnum TG Fish – og næststørstur er eitt felag í Scrabster í Skotlandi.

TG Seafood, sum rekur fiskavirkið í Hvalba, er eisini við, og um hetta felag er Delta Seafood á Tvøroyri partur í keypinum.

Talið av partaeigarum í TG Fish er út við fimmti, og reiðari verður Mikkjal Hammer.

# Manning er til Breiðanes og Hamranes

**Teir flestu, sum fara at manna skipini, sum koma á Hvalba í morgin, eru úr Suðuroy, men onkur einstakur er norðanfjørðs**

MANNING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Mikkjal Hammer, reiðari, segði við Sosialin herfyri, at einir 6-7 mans verða við hvørjum skipi, sum í morgin stevna inn á Hvalba.

- Sum eg havi skilt, sigldu Navarin og Borgarin við 6 monnum, og soleiðis verður tað helst eisini, tá skipini loysa á fyrsta túri.

Hann sigur, at manningarnar til bæði skipini so gott sum eru settar.

- Flestu eru her úr oynni, men onkur einstakur kemur norðanfjørðs. Vit hava eina blanding av royndum fólki og fólki, sum ikki hava so drúgvar royndir. Eg haldi, at skipini verða væl mannað, tá tey loysa, sigur reiðarin.

Tríggir navigatørar, sum hava verið knýttir at lemmatrolaranum Sjagakletti, fara at skiftast um brúnna, tá "nýggju" hvalbiartrolararnir loysa.

Hesir eru Tórhallur Randrup, John Martin Poulsen og Hanus Tausen, allir úr Hvalba.

- Hvussu vit fara at skipa okkum við manning og skifti millum túrar, fáa vit at síggja, tá vit veruliga eru komnir í gongd, sigur Mikkjal Hammer.

Hann ásannar, at tað verður ikki nakar dansur á rósum, sum hann tekur til, at reka skipini.

Reiðarin vísir á, at trolararnir helst skulu fiska fyri einar 30 miljónir krónur um árið, um raksturin skal hanga saman.

- Hetta er eitt stórt veiðivirði, og vit ivast onga løtu í, at hetta verður hart. Skipini skulu rekast væl og skynsamiliga, men fáa vit ongar óvæntaðar trupulleikar at dragast við, hava vit vónir um, at hetta fer at bera til, sigur Mikkjal Hammer.